# - Úr størsta landi til tað besta landið

**Tað er fyrrverandi sendiharri Íslands í Kina, Eiður Guðnason, sum verður fyrsti aðalkonsul í Føroyum - nú íslendingar hava sett egna umboðsstovu í Føroyum**

ALTJÓÐA UMBOÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Rættilig íslendsk innrás var í Havn í gjár, tá uttanríkisráðaharri Íslands, Valgerður Sverrisdóttir, beyð til stóra samkomu - fyrst í Norðurlandahúsinum og síðani í Fútastovu í Gongini, har íslendska aðalkonsuláti hevur til húsa.

Innbodnu gestirnir fingu okkurt gott undir tonna aftur við íslenskum tónleiki. Síðani beyð Valgerður Sverrisdóttir, uttanríkisráðharri, fólkunum inn í Klingruna, har hátíðarhaldið kom fram.

Í røðu síni vísti hon á náttúrliga sambandið landanna millum, og nevndi ymsar føroyingar, sum hava gjøt seg galdandi í Íslandi, teirra millum Jákup á Dul Jacobsen, Eivør Pálsdóttir og Jógvan Hansen, sum seinastu vikurnar hevur gjørt seg galdandi í X-Factor - og sum fríggjakvøldið vann seg í finaluna í hesi so væl umtóktu sjónvarpssangkapping í Støð 2 í Íslandi.

Hon takkaði eisini íslendska konslinum seinastu 22 árini, Poul Mohr, og hon handaði honum boksl við meil (Poul er íðin reiðmaður) við navni innskrivað í reimina.

Poul Mohr tók eisini orðið - takkaði fyri tíðina, og hann kundi ikki halda sær at koma við eini politiskari útmelding:

- Tá vaktarskifti er á skipi, var vanligt, at skiparin sigur kósina hart, og at tann, ið skal loysa av, endurtekur kósina, so eingin misskiljing skal vera. Mín kós er púra greið - tað er beint fram móti einum frælsum Føroyum, segði hann.

Hvussu Eiður Guðnason tók hetta, meldar søgan einki um - men ein so royndur maður í diplomatinum man neyvan koma við politiskum útmeldinum um sambandi Føroya og Danmarkar millum.

Eiður Guðnason kemur úr starvi sum sendiharri Íslands í Kina. Hetta er sum vera man ein stór broyting, men hvussu hetta fór at verða, visti Eiður Guðnason ikki - men hann helt fyri, at hann kom úr tí størsta landinum til tað besta landið!

Jóannes Eidesgaard helt eisini røðu á samkomuni, sum vit prenta niðanfyri.

Eftir hátíðarhaldið í Norðurlandahúsinum koyrdu bussar oman á Kongabrúnna. Síðani savnaðist samkoman niðan fyri Fútastovu, har innsiglið á aðalkonsulátinum varð avdúkað av uttanríkisráðharranum.

Síðani varð boðið til kaffi, te, kleynur og pannukøkur í Fútastovu, sum framyvir verður karmur um diplomatiska sambandið millum Føroyar og Danmark



*Jóannes Eidesgaard heilsaði íslendingunum vælkomnum til Føroya: - Størsta forðingin fyri framburði – í vinnulívinum og í samfelagnum sum heild – er trongskygni. Tí er neyðugt við lærdómi og íblástri uttanífrá. Vit mugu alla tíðina víðka sjónarringin, og tað gera vit best við at samstarva, segði hann m. a.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Valgerður Sverrisdóttir, uttanríkisráðharri Íslands, handaði Poul Mohr, fráfarni konsli, eitt boksl - kanska so hann betur kann halda stýr á hestinum...*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Hjartaliga vælkomnir til Føroya

**Røða løgmans við samkomu í Norðurlandahúsinum í sambandi við, at aðalkonsulát Íslands lat upp 1. apríl 2007**

Uttanríkisráðharri Íslands Valgerður Sverrisdóttir – aðalkonsul Íslands í Føroyum Eiður Guðnason – altingslimir – løgtingslimir – kæra samkoma.

Henda vakra apríldag, har várið nú endiliga hevur fingið bilbugt við ein langan og strævnan vetur, merkja vit í Føroyum eitt fleyr av altjóða vindum. Hetta er ein merkisdagur sæð í uttanríkispolitiskum høpi, tí hetta er fyrstu ferð í nýggjari tíð, at vit fáa diplomatiska umboðan her á landi. Eina umboðan, sum ber boð um, at vit eru partur av alheiminum.

Vegna almennu Føroyar skal eg ynskja íslendska aðalkonsulátinum og aðalkonslinum hjartaliga vælkomin til Føroya og til Havnar.

Við ymisk høvi, havi eg sagt, at Føroyar ivaleyst teljast millum tey einamest avbyrgdu londini í Evropa. Vit eru ikki við í ES, vit eru ikki við í EFTA, vit eru ikki við í EBS, og vit eru ikki fullgildugur limur í Norðurlandaráðnum.

Hetta er ein støða, sum vit vilja at gera nakað við. Isolasjón er vegurin til stagnasjón og afturgongd, meðan samstarv er vegurin til vøkstur og framburð.

Hoyvíkssáttmálin er eitt skilagott stig á vegnum, sum vit fegnast um. Hesin sáttmáli er okkara fyrsta veruliga formliga stig út í altjóðagerðina. Fyrstu stigini eru neyðug fyri at taka tey næstu, tí eisini vit vilja sleppa víðari út í heim.

Navnframi bretski politikarin Winston Churchill segði einaferð, at tjóðir hava ikki varandi vinir ella varandi fíggindar, men einans varandi áhugamál. Hyggja vit út yvir heimskortið, so mugu vit ásanna, at hetta framvegis er galdandi. Fyrrverandi fíggindar eitt nú Stórabretland og Týskland arbeiða nú hond í hond, meðan fyrrverandi vinalond, sum eitt nú USA og Irak hava ligið í kríggi.

Vit føroyingar hava ta fatan, at tað liggur meira í samstarvinum millum Ísland og Føroya enn áhugamál, sjálvt um vit innast inni vita, at áhugamálini hava alstóran týdning. Vit hava langar og drúgvar tradisjónir fyri samstarvi á so nógvum økjum, tó serliga innan fiskivinnuna.

Hin vegin er tað heldur ikki sørt, at ávísir føroyingar hava hug at óttast framsókna íslendska íløguhugin. Vit hoyra dag og dagliga, at íslendingar keypa danskar og bretskar fyritøkur, og vit síggja somu ábendingar her á landi. Ein íslendskur íløguhugur, sum ivaleyst fær trongskygdar sálir at piprast.

Góða samkoma.

Størsta forðingin fyri framburði – í vinnulívinum og í samfelagnum sum heild – er trongskygni. Tí er neyðugt við lærdómi og íblástri uttanífrá. Vit mugu alla tíðina víðka sjónarringin, og tað gera vit best við at samstarva.

So góðu landsmenn, latið okkum fokusera uppá møguleikar heldur enn forðingar.

At alheimsgerðin tekur alsamt størri dik á seg, merkir, at innanlands– og uttanlandsviðurskifti verða alt meiri samantvinnað. Tilgongdin skapar eina støðugt broytta heildarmynd, ið hevur við sær stórar avbjóðingar fyri Føroyar, bæði politiskt, búskaparliga, sosialt og mentanarliga.

Heimurin verður alsamt meiri at líkna við ein og sama marknað við øktum frælsi fyri vørur, kapital, tænastur, fólk og fyritøkur – ein tilgongd, grundað á økt og meiri bindandi politiskt og búskaparligt samstarv, umframt óformligar samgongur og netverk. Hoyvíkssáttmálin er týdningarmikið stig út í heimin, men søgan endar ikki her. Nú mugu vit líta longur suður í heim.

Regin Dahl, sum andaðist í vikuni, spyr í einari av vøkru yrkingum sínum: "Hvar er rás um reynið? "Her hava vit funnið eina gongda rás, men eitt er vist, tað finnast fleiri rásir. Tær finna vit bert, um vit hyggja upp og líta út í heimin við áræði og leitandi eftir møguleikum. Tí Føroyar eru ein tjóð við ríkum tilfeingi, vit eru eitt mentafólk, vit eru eitt evnaríkt fólk, vit eru eitt virkisfúst fólk og vit hava lætt við at laga okkum til broytingar – júst hetta nærfeingi er ein grundleggjandi fortreyt fyri alheimsgerðini, sum vit eru á veg inn í. Rásin er ruddað, so nú er at fara til gongu niðaná.

Góðu íslendingar hjartaliga vælkomnir til Føroya!

Um heilt stutta tíð fara vit at hava móttøku í Íslandi, tá vit lata okkara sendistovu í Reykjavík upp.

Takk fyri.

***Jóannes Eidesgaard***
***løgmaður***